## Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð
## Bygdarráðsfundur tann 28. septembur 2023, kl. 17.00

**Bygdarráðslimir á fundi:** Bjørg á Rógvi, Sára Jógvansdóttir, Eyðun Hansen, Laila Haldansen, Anja Haldansen, Ingi Olsen og John Zachariassen
**Skrivari:** Rúna Ingunardóttir

---

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 208**
Nýval av varalimi til Barnaverndarnevndina í VEKS
J.nr.: 22042-1-2020

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 20. septembur 2023 mál um nýval av varalimi til Barnaverndarnevndina í VEKS.

Joan Vang, umboð í Barnaverndarnevndini í VEKS, hevur fingið starv hjá Barnaverndini og tekur seg tí úr nevndini. Í hennara stað kemur varalimurin Jóna Borgarlíð. Nýggjur varalimur má tí veljast.

Fíggjarnevndin skeyt upp at velja Sigrun Debess Magnussen sum varalim.

**Viðv. 208**
Tilmæli frá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.

**Mál 209**
Eykajáttan til grind - 2. viðgerð
J.nr.: 30102-1-2022

Vestmanna Bygdarráð samtykti einmælt á fundi tann 31. august 2023 1. viðgerð av eykajáttan til grind.

Játtanin til grind er á kr. 19.000
Grindin í Vestmanna tann 14. juni 2023 hevur kostað kr. 114.000 higartil.
Tørvur er á kr. 95.000.
Mælt varð til eina eykajáttan á kr. 100.000 av "Hegn og Bøgarðar"

**Viðv. 209**
Bygdarráðið samtykti einmælt eykajáttanina við 2. viðgerð

**Mál 210**
Umraðfesting av játtan til Talgildu Føroyar - 2. viðgerð
J.nr.: 30102-1-2022

Vestmanna Bygdarráð samtykti einmælt á fundi tann 31. august 2023 1. viðgerð av umraðfesting av játtan til Talgildu Føroyar

Mælt varð til at flyta kr. 384.000
av 147400 - 01-1114350-10 "EDV hald / Internet hald"
til dimentión 731000 - 07-3751350-30 "Flyting til landið"

**Viðv. 210**
Bygdarráðið samtykti einmælt umraðfestingina við 2. viðgerð

**Mál 211**
Eykajáttan til rentustuðul til 1. viðgerð
J.nr.: 30102-1-2022

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 20. septembur 2023 mál um eykajáttan til rentustuðul.

Vísandi til Løgtingslóg um stuðul til rentuútreiðslur av lánum, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 173 frá 21. desembur 2021, er tørvur á eini eykajáttan á kr. 500.000 til rentustuðul.

Umfatandi hækkingin er íkomin vegna rentuhækkingar í 2023 og fleiri nýggjar bústaðar-eigarar.

Fíggjarnevndin samtykti at mæla til at játta eykajáttanina, sum verður fíggjað við hækkaðum skattainntøkum.

**Viðv. 211**
Bygdarráðið samtykti einmælt eykajáttanina við 1. viðgerð

**Mál 212**
Felags nýggjárshald í Vestmanna
J.nr.: 2015002

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 20. septembur 2023 mál um felags nýggjárshald í Vestmanna.

Umsitingin hevur sett nevndini fyrispurning um kommunan aftur skal skipað fyri felags nýggjárshaldi í Vestmanna kommunu.

Vestmanna kommuna hevur keypt fýrverk saman við áhugafelagsskapinum "Nýggjársnevndin í Vági".

Í 2020 kostaði nýggjárið kr. 137.000 harav fýrverk kr. 105.000
Í 2021 kostaði nýggjárið kr. 134.000 harav fýrverk kr. 110.000
Í 2022 kostaði nýggjárið kr. 143.000 harav fýrverk kr. 108.000

Annar kostnaður er til mat, tilfar, olju til blikk, skjóting og faklar

**Samskipan og ábyrgd**
Ein áhugafelagsskapur “Blikkamenninir” skipar seg sjálvur.
Samskipandi leikluturin til hini tiltøkini liggur í umsitingini.

**Loyvi at brenna bál.**
Vestmanna kommuna loyvir ikki privatum borgarum ella áhugafelagsskapum at brenna bál á nýggjárinum.

Fíggjarnevndin samtykti at leggja málið fyri bygdarráðið til støðutakan.

**Viðv. 212**
Sára Jógvansdóttir skeyt upp, at kommunan aftur skuldi fara at eggja tí privata initiativinum og geva grannaløgum loyvi til at brenna bál á nýggjárinum undir vanligum treytum.

Uppskotið hjá Sáru Jógvansdóttir varð einmælt samtykt.

Ingi Olsen skeyt upp, at tey fólkini, sum seinnu árini hevur skipa fyri skjótingini, skipa seg sum áhugafelagsskap og fáa stuðul á kr. 90.000 frá kommununi til at keypa fýrverk fyri.

Sára Jógvansdóttir, Eyðun Hansen, Laila Haldansen, Anja Haldansen, Ingi Olsen og John Zachariassen atkvøddu fyri.

Bjørg á Rógvi, borgarstjóri, atkvøddi ímóti keyp av fýrverk.

Uppskotið hjá Inga Olsen varð samtykt.

**Mál 213**
Eykajáttan til tannklinikk - 1. viðgerð
J.nr.: 30102-1-2022

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 20. septembur 2023 mál um umraðfesting av játtan til tannklinikk.
Vegna kostnaðarmiklar umvælingar á tannklinikkina mugu tillagingar gerast
Farið er útum játtanina fyri 2023 við kr. 71.000

Fíggjarnevndin samtykti einmælt at játta eykajáttanina av rakstarkonto hjá umsiting.

**Viðv. 213**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.

**Mál 214**
Umraðfesting av játtan til Kirkjugarðar - 1. viðgerð
J.nr.: 30102-1-2022

Tekniska Nevnd viðgjørdi á fundi tann 18. septembur 2023 møguligar umraðfestingar av játtanini á fíggjarætlanini fyri 2023 til kirkjugarðar.

Á Verk.fo, sum ger arbeiði klárt til útbjóðing, verður sagt, at tað er ósannlíkt, at arbeiðið uppá víðkan av kirkjugarðinum á Knúgvum byrjar í ár - undir øllum umstøðum í minni mun.

Nevndin mælir tí til at umraðfesta upphæddina soleiðis:

| | | |
|---|---|---|
| 1 | breiðkan av Niðara Vegi | kr. 1.500.000 |
| 2 | avvatna og asfaltera miðstaðarøkið | kr. 700.000 |
| 3 | taka niður garð og gera klárt at laða við Niðara Veg 49 | kr. 150.000 |
| 4. | rekkverk og portur við Heimið á Grønanesi | kr. 50.000 |
| 5. | Nýggjar parklyktir við gøtuna úr Skálum niðan til Garðaveg | Kr. 72.300 |

Tilsamans kr. 2.472.300

**Viðv. 214**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.

**Mál 215**
Ungdómstilboð til børn í 6. flokkið
J.nr.: 1800002-1-2023

Mentanarnevndin viðgjørdi á fundi tann 18. septembur 2023 uppskot frá Gabriel Sebastian Apetrei, ungdómsleilara á Staðnum, um at Staðið framyvir eisini skal fevna um 6. flokk.

Mentanarnevndin mælti til at samtykkja uppskotið hjá ungdómsleiðaranum.

**Viðv. 215**
Tilmælið frá Mentanarnevndini varð einmælt samtykt.

**Mál 216**
Fráboðan frá umhvørvisstovuni til Elfelagið SEV um góðkenning av royndarverkætlanini við einum D12 sjóvarfalsorkuverki í Vestmannasundi.
J.nr.: 9050002-2-2023

Havnanevndin viðgjørdi á fundi tann 18. septembur 2023 fráboðan frá Umhvørvisstovuni til Elfelagið SEV um góðkenning av royndarverkætlanini við einum D12 sjóvarfalsorkuverki í Vestmannasundi.

Umhvørvisstovan hevur ikki tikið viðmerkingarnar frá Vestmanna Bygdarráð í skrivi, dagf. 6. juni 2023, til eftirtektar, og tí mælir nevndin til at kæra avgerðina hjá Umhvørvisstovuni.

**Viðv. 216**
Tilmælið frá Havnanevndini varð einmælt samtykt.

**Mál 217**
Fíggjarætlan 2024 fyri Vestmanna kommunu
J.nr. 30102-1-2023

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 23. august 2023 fíggjarætlan fyri Vestmanna kommunu fyri 2024.

Sambært stýrisskipan fyri Vestmanna Bygdarráð **§13** skal uppskot til fíggjarætlan leggjast fyri bygdarráðið áðrenn 1. oktobur.

Fíggjarnevndin samtykti einmælt at leggja fíggjarætlan 2024 fram.

**Viðv. 217**
Uppskotið til fíggjarætlan fyri Vestmanna Kommunu fyri 2024 varð lagt fram.

**Mál 218**
Umsókn um stuðul til M/S Ólavur
J.nr.: 200000-28-2023

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 20. septembur 2023, umsókn frá Bárður á Steig Nielsen um fíggjarligan stuðul til "M/S Ólavur".

Í telduposti, dagfest tann 4. septembur 2023 sendi Bárður á Steig Nielsen umsókn um fíggjarligan stuðul til at seta søguliga træskipið "M/S Ólavur" í uppruna stand.

Á fundi við Bygdarráðið tann 31. august 2023 segði umsøkjarin, at hann søkti um kr. 150.000.

Fíggjarnevndin samtykti einmælt at mæla til at stuðla fíggjarliga við kr. 150.000.

**Viðv. 218**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.

*Sára Jógvansdóttir fór av fundinum vegna ógegni.*

**Mál 219**
Umsókn um stuðul til barnajólatiltak
J.nr.: 2000002-35-2023

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 20. septembur 2023 umsókn frá Sáru Jógvansdóttir um stuðul til jólatiltak.

Í skrivið umvegis Vangan, dagfest tann 4. septembur 2023, sendi Sára Jógvansdóttir umsókn um fíggjarligan stuðul til jólatiltak fyri børn í Vestmanna.

Søkt varð um kr. 20.000 umframt hjálp til at seta pall og ljósútgerð upp og at rudda aftur.

Fíggjarnevndin samtykti einmælt at mæla til at stuðla fíggjarliga við kr. 20.000

**Viðv. 219**
Tilmælið frá Fíggjarnevndini varð einmælt samtykt.

*Sára Jógvansdóttir komin aftur á fundin.*

Bókin lisin. Fundur lokin kl. 18:40

Sign.:

Bjørg á Rógvi Sára Jógvansdóttir Eyðun Hansen

Laila Haldansen Anja Haldansen Ingi Olsen John Zachariassen